gult cyan magenta svart

Jenis av Rana eftir rokfund í Pentagon:

Spyr løgmann um rakettverjuna

Jenis av Rana fer at spyrja løgmanni um, hvørt amerikumenn skulu brúka NATO-stø›ina í Føroyum í n‡ggju rakettverju-skipanini

VERJUMÁL
Ey›un Klakstein

Løgtingsma›urin Jenis av Rana fer nú at seta løgmanni skrivligan fyrispurning um n‡ggju rakettverjuskipanina hjá USA.

Jenis fer at spyrja løgmann, um hann kennir naka› til, at Føroyar eru vi› í hesi skipan, og um nakar hevur vent sær til landsst‡ri› um hesa skipan.

Hetta ger Jenis av Rana eftir ein rokfund í amerikanska verjumálará›num, Pentagon, sí›st í oktober mána›i.

Bylgjurnar gingu so høgt á hesum fundi, at danir hildu eftir fundin fyri, at hetta var helst seinastu fer›, at teir vóru bodnir ha›ar.

Fekk illgruna

Jenis av Rana var í oktober mána›i á ST-fundi í New York. Sí›st í oktober mána›i gjørdi eitt nor›urlendskt fer›ali› ein túr til Washington, har tey vitja›u í ymsum stjórnarbygningum og a›rasta›ni.

Jenis av Rana setir nú løgmann fyrispurning eftir rokfund í amerikanska verjumálará›num

Millum anna› var› vitja› í amerikanska verjumálará›num, Pentagon, og ta› gjørdist ein lívligur fundur, har føroyska umbo›i› eisini enda›i uppi í.

– Umbo›ini fyri Pentagon fóru illa vi› grønlendska fólkatingsumbo›num, Ellen Kristensen, tá hon spurdi um n‡ggju rakettverjuskipanina, sum Grønland ver›ur ein partur av. Hon fekk at vita, hetta hev›i hon einki vi› at gera, tí ta› var eitt mál millum USA og Danmark, grei›ir Jenis av Rana frá.

– Hetta fekk meg at vakna, tí kanska er ta› sama galdandi fyri Føroyar. Kanska skulu vit ver›a vi› í rakettverjuni, uttan at vita vita av tí. Slíkt loyniligt virksemi hevur á›ur veri› í Føroyum, sigur Jenis av Rana.

Lívligt kjak

Jenis av Rana spurdi, um Føroyar kanska eisini hava ein leiklut í hesi verjuskipanini, men hann fekk eitt har›ligt svar frá Pentagon-manninum.

– Eg var sjokera›ur av svarinum, tí hann pástó›, at ta› hev›i ongantí› veri› nøkur herstø› í Føroyum, og hann royndi at ni›urgera føroyingar, grei›ir Jenis frá.

– Ta› læt eg mær ikki lynda, og ta› gjørdist til eitt lívligt kjak. Eg greiddi millum anna› frá, at eg bú›i stutt frá NATO-stø›ini, og at eg helt ta› ver›a undarligt, at hann skuldi siga, at eingin stø› var í Føroyum.

Seinni vi›urkendi Pentagon-ma›urin, at ta› kanska hev›i veri› ein stø› í Føroyum, og hóast kvinnan, sum skipa›i fyri túrinum í Pentagon, royndi at bera í bøtuflaka fyri bersøgna embætismanninum, hev›i Jenis fingi› ein ódámligan illgruna.

Spyr løgmann

Jenis av Rana vísir á, at amerikumenn á›ur hava havt virksemi í Føroyum, sum teir hava roynt at fjala fyri føroyska fólkinum.

– Hendan hendingin minnir nógv um fortí›ina, tí ta› var vanligt, at føroyingar fingu líti› ella einki at vita um herna›arlig vi›urskifti, tí ta› tók Danmark sær av fyri okkum, sigur hann.

– Tí fari eg at seta løgmanni ein fyrispurning um máli›. Eg fari at spyrja hann, um hann kennir naka› til n‡ggju rakettverjuskipanina, og um nakar hevur sett seg í samband vi› landsst‡ri› um hetta.

– Eg ætli mær eisini at spyrja løgmann, um hann heldur seg kenna sannleikan í hesum máli. Hetta geri eg, tí landsst‡ri› hevur ikki alti› fingi› allan sannleikan í herna›arligum málum, sigur Jenis.

Fyrispurningurin ver›ur væntandi latin løgtinginum mánadagin.

Føroya Kolvetni

søkir eftir starvsfólkum



Geologur/geofysikari

Høvuðsuppgávan verður at byggja upp eina geologiska deild, ið skal viðgera seismiskar og geologiskar týðingar.

Uppgávan verður eisini at gera tilráðingar um nýggjar ætlanir og umboða felagið á samtaksfundum.

Arbeitt verður bæði í Føroyum og Bretlandi.

Væntað verður, at tú hevur viðkomandi útbúgving, minst 2 ára royndir á bretskum/norskum øki, og at tú tosar og skrivar føroyskt og enskt.

Tilvísing verður til stjóran.

Vit kunnu bjóða góða løn, íroknað "share options", eitt altjóða arbeiðsumhvørvi og møguleika fyri fakligari menning.



Skrivari/fyrisiting

Uppgávan verður at taka sær av allari vanligari fyrisiting og skrivarauppgávum. Í fyrstani verður starvið parttíðarstarv við flexiblari arbeiðstíð.

Væntað verður, at tú hevur viðkomandi útbúgving og nakað av royndum. Eisini verður væntað, at tú tosar og skrivar føroyskt og enskt. Kunnleiki til bókhald hevur fyrimun. Løn sambært avtalu.

Umsóknarfreistin fyri bæði størvini er 31. desember 2000.

Vit flyta -
Frá 14. desember 2000

Føroya Kolvetni P/F
Bryggjubakki 22, 110 Tórshavn
Postbox 1098
Tlf. 320450 - Fax 320451
e-mail: forkol@post.olivant.fo

Føroya Kolvetni er leitioljufelag við egnum seismiskum databasa. Føroya Kolvetni er nýtt oljufelag við greiðum leitiætlanum á djúpum vatni og hevur Atlantsmótið sum høvuðsøki. Felagið hevur samstarvsavtalu við bretska oljufelagið Dana Petroleum plc., ið veitir tekniska, fíggjarliga og strategiska ráðgeving. Føroya Kolvetni hevur fingið tillutað, saman við Agip sum operatøri, tvey leitiloyvi í Føroyum.

Stóru b‡rá›ini kalla› inn

KOMMUNUVAL
Ey›un Klakstein

Fyrstvaldu b‡rá›slimirnir í Havn og í Klaksvík – Jákup Suni Joensen og Jógvan vi› Keldu – hava kalla› n‡valdu b‡rá›ini saman.

B‡rá›i› í Havn skuldi savnast í gjárkvøldi›, og í Klaksvík ver›ur fundur mánadagin.

Á fyrsta fundinum fara b‡rá›ini at skipa seg formliga. Veljast skal lei›sla, og allar nevndirnar ver›a manna›ar.

Bæ›i Havn og Klaksvík fáa n‡ggjan borgarstjóra. Í Havn fer Jan Christiansen at avloysa Leiv Hansen, og í Klaksvík fer Steinbjørn Jacobsen at taka vi› eftir Jógvan vi› Keldu.

Tveir mans, sum millum anna› eru kendir innan ítróttin, ver›a næstformenn í Havn og Klaksvík.

He›in Mortensen, forseti í Ítróttarsambandinum, ver›ur næstforma›ur í Havn, og Torleif Sigur›sson, sum er forma›ur í Fótbóltssambandinum, ver›ur næstforma›ur í Klaksvík.

Høsnarungi mundi bast vágbingi

Vágbingurin Hallur Augustinussen, sum b‡r í Keypmannahavn, gjørdist illa sjúkur av salmonellu eftir at hava eti› á kinesiskari matstovu. Nú hevur danska Forbrúkarará›i› stevnt matstovuni, og hetta er ta› fyrsta máli› av sínum slag í Danmark

SALMONELLA
Stefan í Skorini

Ein heystardag í fjør vór›u ikki færri enn 43 fólk smitta› av salmonellu, eftir at tey høvdu keypt mat frá eini kinesiskari matstovu mi›skei›is í Keypmannahavn.

Danska Forbrúkarará›i› metti, at hetta var eitt so álvarsamt mál, at ta› hevur stevnt kinesisku matstovuni.

Illa sjúkur

Sama dagin, sum 23 ára gamli vágbingurin Hallur Augustinussen hev›i keypt sær ein bita av innbaka›um høsnarunga á matstovuni China Box, leg›ist hann sjúkur.

– Tá eg var varugur vi›, at høsnarungin var rey›ur og ikki ordiliga stoktur, tveitti eg hann burtur, men tá hev›i eg longu fingi› mær nakrar bitar, sigur Hallur.

– Eg fór heim og steinsovna›i. Tá eg vakna›i, hev›i eg nógvan fepur og pínu í búkinum. Eg hev›i krampa í búkinum, og tarmarnir ryktu seg saman, sigur Hallur.

Hann fór so á ska›astovuna og var› innlagdur. Har lá hann í nakrar dagar. Tá ein vika var› li›in, kundi Hallur fara aftur í skúla, men hann følir tó árinini av salmonelluni eitt ár eftir, tí magin er ikki bygdur uppaftur enn.

Fødevaredirektoratet var í køkinum á matstovuni og gjørdi kanningar, og har var› sta›fest salmonella í fleiri stø›um. Eisini er ta› komi› fram, at kokkurin hev›i salmonella.

Fleiri vi›urskifti vóru ikki í lagi, og t.d. vaska›i kokkurin sær ikki um hendurnar eftir at hava veri› á bukkuni.

Arbei›a vi› málinum

Forbrúkarará›i› skriva›i til Fødevaredirektoratet um at fáa uppl‡singar um, hvør var› smitta›ur. Fødevaredirektoratet heitir sí›ani á Hall og onnur, sum høvdu veri› sjúk, um at venda sær til Forbrúkarará›i›.

Fødevaredirektoratet valdi tey burturúr, sum høvdu fingi› ta› sama slagi› av salmonellu, so at ein stevning lættari kundi or›ast. Fimm hava vent sær aftur til Forbrúkarará›i›.

Millum tey smitta›u vóru eini 30 sviar, sum Forbrúkarará›i› ikki kann stevna fyri.

Líti› gruna›i Hallur Augustinussen úr Vági, tá hann keypti sær ein bita av høsnarunga á kinesiskari matstovu í Keypmannahavn, at hann fór at vera partur av rættarmáli, sum kanska endar í Hægstarætti

Hallur hevur veri› á fundi vi› Forbrúkarará›i›, har hann gav teimum sjúkradagbókina og greiddi frá sjúkragongdini. Hallur skal aftur á fund vi› Forbrúkarará›i›, og tá skulu tey tosa nærri um máli›.

Ikki úti eftir peningi

Endurgjaldskrav ver›ur sett fram móti matstovuni, men Hallur leggur dent á, at hann ikki bara er úti eftir peningi.

– Eg vil fegin vera vi› at ste›ga slíkum, at matstovur kunnu langa vandamiklan mat um diskin uttan at ver›a revsa›ar fyri ta›, sigur Hallur.

– Um tær fáa eina revsing nú, fara a›rar matstovur at taka anna› skinn um bak, so ta› kanska ber til at eta trygt úti, sigur Hallur.

Hallur er fyribils givin at keypa mat á matstovum, men ger allan matin sjálvur heima.

Fyrst av sínum slag

Hetta rættarmáli› er søguligt. Einki líknandi mál hevur fyrr veri› í danskari rættarsøgu, og tí vekir ta› miklan ans. Fjølmi›larnir hava eisini gjørt nógv burturúr og hava trá›spurt Hall um bæ›i líkt og ólíkt.

Vanligt er, at mál fyrst fara í B‡rættin, men hetta fer óiva› beinlei›is í Landsrættin, tí ta› er av "prinsipiellum karakteri". Ta› er eisini væntandi, at máli› endar í Hægstarætti.

Hóast ta› er eitt ár sí›ani tilbur›in, so væntar Hallur ikki, at máli› kemur fyri í rættinum fyrr enn um eitt ár, og ta› fara kanska at ganga eini tr‡ ár, til dómur ver›ur sagdur.

Hetta er tí, at matstovan kanska fer at stevna sínum útvegara.

Thomas Rørdam, sum hevur havt fleiri mál í Føroyum, er sakførari hjá Forbrúkarará›num.

Hallur sigur seg vænta, at tey fara at vinna máli›, og at rætturin fer at geva teimum vi›hald, tí hann heldur, at prógvini eru somiki› sannførandi.

Hallur skal vitna í rættinum, tá máli› kemur fyri.

Brennistø›in nútímansgerast

Brennistø›in á Sandvíkahjalla er gomul og slitin. Tí er ney›ugt at fremja umvælingar og útskiftingar. Forma›urin í Heilsu- og Umhvørvisnevndini, Ingi Mohr, fer at mæla b‡rá›num til at gera eina íløgu uppá 90 milliónir krónur í brennistø›ina

BRENNISTØ‹IN
Stefan í Skorini

Kommunala orku- og brennistø›in fór undir at brenna rusk í 1987. Tá leyk hon øll umhvørviskrøv, sum vór›u sett, men hesi krøv eru sí›ani nógv herd.

Í løtuni l‡kur brennistø›in ikki øll krøv, sum eru galdandi í Nor›urlondum og ES. Brennistø›in hevur t.d. ikki útger› at reinsa súran royk. Tískil er ney›ugt at nútímansgera brennistø›ina.

Í hesum sambandi er ein frágrei›ing og ætlan gjørd av b‡rá›num. Arbeitt hevur veri› vi› hesum í tvey ár, og nú er hon so klár.

Her eru ymisk uppskot um, hvussu stø›in kann nútímansgerast, so at hon kann lúka krøvini.

Ingi Mohr mælir til, at ein íløga á 90 milliónir ver›ur gjørd, har taki› ver›ur hækka› og ein n‡ggjur ovnur settur í. Tá ber eisini til at reinsa roykin.

Brennistø›in tekur ímóti eini 15.000 tonsum av ruski um ári›, og hon brennir millum 40 og 53 tons um dagin.

Ingi Mohr sigur, at ovnurin skal skiftast út í seinasta lagi í 2005, tá hann er útslitin. Tískil er ta› ney›ugt, at peningur ver›ur settur av beinanvegin.

Ingi Mohr, forma›ur í heilsu- og umhvørvisnevndini, mælir b‡rá›num til at gera eina íløgu á 90 milliónir í Brennistø›ina, so at hon kann lúka altjó›a umhvørviskrøv